## Hvat er AA

Anonymir Alkoholikarar er felagsskapur av monnum og kvinnum, ið býta royndir, styrki og vón fyri at kunna loysa teirra felags trupulleikar, og harvið hjálpa øðrum at endurreisa heilsuna aftaná misnýtslu av alkoholi.

Tað einasta, ið krevst fyri at gerast limur, er ynski um at gevast við at drekka. Einki limagjald verður goldið og AA fíggjar seg sjálvt við egnum sjálvbodnum gávum.

AA hevur ikki tilknýti til nakra sekt, trúarbólk, trúarrætning, politiskan bólk ella stovn.

AA tekur onga støðu í stríðsspurningum og vil hvørki berjast fyri ella stuðla nakrari óviðkomandi sak.

Einasta endamál okkara er at halda okkum edrú og at hjálpa øðrum at uppnáa edrúskap.

**Heitt verður á AA bólkar og limir í øllum Føroyum at stuðla tiltakinum við peningagávu til stevnuna á konto:**

**9870 - 4086377**

**Pengarnir fara til flogbillettir til gestir, leigu av hølum og til mat. Møguligt avlop fer óskert til næstu stevnu.**

# AA stevnan ‘24

Samanhald
og
sálarfriður

Seglloftið á Tvøroyri
27. – 29. september 2024

Øll eru vælkomin!

# Skráin

## Fríggjakvøld

**18.00 – 20.00** Skráseting og ein biti
**21.15 – 22.15** AA Hvalba
**22.30 – 24.00** Samanhald og sálarfriður

## Leygardagur

**07.30 – 09.00** Morgunmatur
**09.00 – 10.00** ACA fundur
**10.15 – 11.15** AA fundur
*- Hóskvøld, Vesturkirkjan*
**11.30 – 13.00** Matarsteðgur
**13.00 – 15.00** AA fundur
*- Speakarafundur, danskur gestur*
**15.30 – 16.30** AA fundur
*- AA bólkur skipar fyri*
**18.00 – 20.00** Døgurði
**20.00 – 21.00** Speakarafundur
*- Royndir, styrki og vón*
**21.30 – 22.30** Ljósfundur
*- Í kirkjuni*

## Sunnumorgun

**07.30 – 09.00** Morgunmatur
**10.15 – 11.15** Al Anon fundur
**11.30 – 12.45** Matarsteðgur
**13.00 – 14.00** AA fundur

**Allir fundir eru opnir**
**Te, kaffi og køkur er at fáa alt vikuskifti**

# Hent at vita

Í samband við, at fyrsti AA fundurin í Føroyum var 25. september í 1983 verður skipað fyri AA stevnu. Stevnan er opin, og øll eru vælkomin.

Karmurin um stevnuna er Seglloftið á Tvøroyri.

Morgunmatur, døgurði og nátturði er at fáa á staðnum. Somuleiðis kaffi, te, køkur og frukt.

Møguleikar hjá øðrum 12-stiga felagsskapum at skipa fyri fundum eru eisini góðir.

Stevnan er fyri alkoholikarar, avvarðandi og vinir.

Luttakarar mugu sjálvir tryggja sær gisting í oynni. Ymsir gistingar-møguleikar eru, bæði viðvíkjandi kostnað og stað. Meir um hetta er at finna á: visitsuduroy.fo

- Sjálv stevnan er ókeypis.

Tó verður eitt gjald á kr. 300,- fyri hvønn luttakara fyri mat hesar dagarnar, sum skulu **flytast á konto 9870-4086377 í seinasta lagi 23. september.** Íroknað gjaldið er nátturði fríggjakvøldið, allar máltíðir leygardag, umframt morgunmatur og miðmáli sunnudag. Kaffi og køkur er til taks allar dagar.

Stevnan verður fíggjað sambært sjeynda siði. Kurvar vera tí á staðnum, har tú kanst lata eitt sindur av peningi. Peningurin fer óskerdur til útreiðslur í sambandi við stevnuna, og við vón um, at stevnan verður eitt afturvendandi tiltak.

-

**Vit eru fólk, sum vanliga ikki vildi komið saman.**
**Men okkara millum finst ein felagsskapur, eitt vinalag og ein máti at skilja hvønn annan uppá, sum er ómetaliga vakur.**

*Anonymir alkoholikarar, kap. 2*